## Eldri tónleikur og dansitónleikur í Glitni

DANSUR

Hóskvøldið og sunnukvøldið verða cafékvøld í Glitnir við teimum góðu 60'ara, 70'ara og 80'araslagarunum, ið Andras Arge fer at spæla frá kl 21.

Fríggjakvøldið og leygarkvøldið verður stórur enskur dansir, har teir vælumtóktu Hans Andreas og Jentoft, ið manna bólkin LM Band, fara at spæla. Teir eru vælumtóktir, tá talan er um góðan dansitónleik, og fara teir at fjlaga gestirnar hesi bæði dansikvøldini, siga tey úr Glitni.

## Fyrilestur um konservering av listarverkum

**Í annaðkvøld, mikukvøldið, KL 19 verður almennur fyrilestur um konservering av listarverkum í Listasavni Føroya**

LIST

Felagskonserveringin í Århus er eitt almannagagnligt felag, sum er sett á stovn av donskum listasøvnum í 1982 við tí endamáli at varðveita listaverk í tilknýttum listasøvnum við at konservera, umvæla, granska og hava søvn og bygningar undir umsjón. Listasavn Føroya er í 2004 vorðið tilknýtt felagskonserveringina, sum síðan stovnsetingina harumframt hevur víðkað grundarlagið og konserverað fyri eini røð av privatum viðskiftafólkum og stórum virkjum, m.ø. slottum og harragørðum.

Deildarleiðarin Dorthe Aggerholm úr Felagskonserveringini í Århus fer at halda fyrilestur um konserveringina og umvælingina av málningum, serliga eftir S. J. Mikines. Tey hava konserverað 25 listarverk hjá Listasavninum 2004-05 eftir Mikines.

Fyrilesturin verður mikukvøldið 2. november 2005 kl. 19 í Listaskálanum.

Øll eru vælkomin at taka egin verk við, tí eftir fyrilesturin ber til at fáa eina meting av varðveitslustandinum.

Felagskonserveringin hevur tvær deildir, ein á Kronborg Slot og hin á ARoS, Århus Kunstmuseum. Deildirnar umfata alt Danmark.

www.faelleskonserveringen.dk

## Petur spælir í Losjuni



Mánadagin kemur fyrsta fløgan hjá Peturi Pólsyni í handlarnar, í hesum sambandi spælir Petur og bólkur hansara leygarkvøldið konsert í Losjuni við Gøtugjógv. Kára Sverrisson og Guðrið Hansen vera somuleiðis við sum serligir gestir.

Sambært tíðindaskrivi frá G-music, er tónleikurin ein áhugaverd samanseting av ymiskum íblástrum úr ymiskum sambondum, úr ymiskum tíðarskeiðum, sum Petur hevur arbeitt- og verið við í.

Talan er um okkurt slag av rokktónleiki, í støðum í ætt við bæði Clickhaze og Visible Fish, men samstundis við sterkari rót til sangskrivarar sum eitt nú Bob Dylan, Nick Cave, Leonard Cohen, Tom Waits.

Temaini eru tey tungu og ævigu - lívið og deyðin, kærleiki og hatur, frelsa og glatan, Gud og Sátan. Løg og tekstir kunnu metast sum bersøgin og erlig. Bogi á Lakjuni, sum eins og Petur, var við í bæði Visible Fish og Clickhaze, hevur framleitt fløguna og Óli Poulsen hevur ljóðblandað.

Tónleikararnir, sum Petur hevur afturat sær, eru allir virknir og virdir í fleiri ymiskum samansetingum, men hava flest allir spælt í bólkinum hjá Knút H. Eysturstein.

**nud**

# Lis og Annlis stjórna Javna

**Javni hevur fingið nýggjan forkvinnu og dagligan leigara. Lis Eklund í Niðristovu er forkvinna, meðan Annlis Bjarkhamar er settur sum dagligur leiðari**

JAVNI



*Diana í Puntabyrgi (hm), fyrrverandi formaður og ein av eldsálunum í Javna, ynskir Lis Eklund í Niðristovu (vm), nýggja formanni felagsins, bestu eydnu við arbeiðinum. Í miðjuni Annlis Bjarkhamar, nýsettur dagligur leiðari*

Leygardagin 29. oktober kl. 15.00 helt Javni eykaaðalfund. Á skránni var val av formanni og val av nýggjum nevndarlimi. Lis Eklund í Niðristovu, nevndarlimur, var vald til formann, og í hennara stað kom Turid Askham í nevndina.

Nýggi formaðurin, Lis Eklund í Niðristovu, hevur drúgvar leiðsluroyndir. Í mong ár var hon stjóri á Hotel Føroyum, og eitt skifti sat hon í nevndini í Javna. Eftir steðg í nøkur ár var hon aftur vald í nevndina í Javna seinasta vár, og nú á eykaaðalfundinum tók hon við formansstarvinum.

Støðan var tann, at á ársaðalfundinum 30. apríl hevði tað ikki eydnast at fáa nakað formansevni undan aðalfundinum, tá formaðurin seinastu árini ikki tók við afturvali. Sostatt var avgjørt at boða til eykaaðalfundar, tá formansevni var tókt. Fyribils skuldi so næstformaðurin vera virkandi formaður.

Síðani ársaðalfundin í apríl hevur nevndin tí arbeitt við spurninginum, hvussu best er at skipa felagið. Hetta førdi so til, at dagligur leiðari er settur at reka virksemi felagsins, so formansstarvið í størri mun verður saman við nevndini at stinga út í kortið. Nevndin ætlar at leggja dent á at skipa arbeiðið meira sum avmarkaðar verkætlanir, har tað vónandi ber til at fáa fleiri fólk at taka lut.

Undan aðalfundinum leygardagin hevði Javni eisini fund við økisnevndirnar. Á fundinum var arbeitt við at raðfesta uppgávurnar, ið Javni skal arbeiða við komandi tíðina umframt at savna ítøkilig hugskot um, hvussu farast skal til verka. Á fundinum varð eisini kunngjørt, at Javni hevur sett Annlis Bjarkhamar í starv sum dagligan leiðara. Annlis Bjarkhamar er útbúgvin lærari, og hon hevur fjølbroyttar royndir umsum verkætlanarleiðari umframt royndir sínar frá politikki. Eitt skifti var hon jú landsstýriskvinna í skúla- og mentamálum. Sjálv kennir Annlis eisini nakað til viðurskiftini hjá menningartarnaðum.

Javni, ið er eitt gamalt felag, hevur øll árini verið eitt virkið felag. Við nýggja bygnaðinum ynskir nevndin at laða felagsarbeiði eftir teimum krøvum og umstøðum, sum nútíðin hevur. Aðalmálið er enn sum áður at stuðla fólki við menningartarni og teirra avvarðandi.

# Spiðar 5 í Mentanarhúsinum

**Leygarkvøldið 5. november fer frálíki dansibólkurin, Spiðar 5 at spæla til almennan dans í Mentanarhúsinum í Fuglafirði**

DANSUR



Nú leygardagin fara garvaðu tónleikararnir úr bólkinum Spiðar 5 á pallin í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Eftirspurningurin eftir bólkinum er stórur, og bólkurin spælir eisini nógv fyri tíðina. Tað er kortini nakað síðani at teir spældu í Fuglafirði, so teir lova øllum sum koma í dans leygarkvøldið eitt gott og fjølbroytt dansikvøld.

Seinasta vikuskiftið spældi bólkurin fyri umleið 300 kátum HB-viðhaldsfólkum ísambandi við ársveitsluna hjá HB, og tað fættist, at stemningurin var sera góður, og dansigólvið var á tremur alla náttina.

Teir sum manna Spiðar 5 er allir garvaðir tónleikarar og kendar frá mongum øðrum bólkum. Tónlistarliga spennir bólkurin sera vítt, og spælir bæði nýggjan og góðan gamlan tónleik. Felags fyri tónleikin er, at alt er dansitónleikur.

Manningin í Spiðar 5 er, Jóan Magnus Danielsen, sang og guitar, Ólavur Øster, guitar, Thorberg Johannesen, sang og bass, Jógvan Olsen, tangentar og Jonleif Jensen, trummur.

Fuglfirðingar vóna at síggja mong til stóra dansitiltakið leygarkvøldið. Tað eru ÍF-stuðlar, sum skipa fyri dansinum við Spiðar 5 í Mentanarhúsinum leygarkvøldið 5. november. Dansitiltakið byrjar kl. 00.30. Aldursmarkið er 18 ár og fáast atgonumerki við dyrnar.